


# Matador eitt vónbrot á palli

**Ummælararnir brúka hørð orð um sangleikin, ið er bygdur á sjónvarpsrøðina Matador. Keypið heldur sjónvarpsrøðina á dvd enn at keypa atgongumerki til sangleikin, heldur ein ummælari**

## Sangleikur

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Ein nýggjur sangleikur, sum byggir á sjónvarpsrøðina Matador, verður í hesum døgum sýndur í Operuni í Keypmannahavn. Áhugin fyri hesum sangleiki hevur verið sera stórur, og fleiri enn 60.000 atgongumerki eru longu rivin burtur.

Matador er best umtókta sjónvarpsrøðin í Danmark nakrantíð, og hóast røðin hevur verið endursend fleiri ferðir á DR, hevur hyggjaratalið verið ovurhondsstórt hvørjaferð.

Matador er stóri gimsteinurin millum perlurnar í donskum sjónvarpi.

### Leikurin er rótutur

Nú hevur leikstjórin Peter Langdal sett upp eina sangleik við Matador, og tónaskaldið Bent Fabricius-Bjerre hevur verið við til at gjørt tónleikin til hendan sangleik.

Ummælarar er tó meira ella minni samdir um at verða skuffaðir av sangleikinum, sum teir ikki halda verða nakað serligt.

»Vi flintrer og farer så stakåndede ud af Damernes Magasin, Korsbæk Bank og familien Varnæs' spisestue, at man har lyst til at istemme Hans Christians bebrejdende bemærkning til den forvirrede hustru hen over matador-brættet: 'Det er noget rod, Maude'«, skrivar ummælarin hjá Berlingske Tidende, Jakob Steen Olsen.

Eitt annað stórt danskt dagblað, Politiken, er heldur ikki serliga jaligt móti leikinum.

»Stik imod sin evne til at give ting et rabiat twist har Peter Langdal holdt sig alt for respektfuldt inden for den opkridtede bane. Selv om forestillingen strammer sig op og bliver mere fængende undervejs, har den svært ved at finde sit fokus. Som forestilling kan den ikke stå selv«, skrivar Monna Dithmer.

### Meira kaos

Fleiri av ummælarunum vísa á, at sangleikurin gongur ov skjótt fyri seg, og at stundir eru ikki til at fara í dýbdina.

»Bortset altså lige fra troværdigheden, tyngden og den psykologiske mennesketegning, der gjorde Lise Nørgaards original så god. Musicalformens stærke muligheder for følelsesmæssige højdepunkter fravælges konstant, fordi der kun er tid til et enkelt eller to vers fra hver sang, inden vi skal videre«, skrivar Henrik Lyding, ummælari á Jyllands-Postinum.

Kristeligt Dagblad fer so langt, at tað kallar sangleikin fyri kaos.

»Hvorfor var det lige, at det skulle være en fremragende idé at lave all tiders største, mest velskrevne, ikonagtige tv-serie om til musical? Hvis det havde været et fedt show, så fint med mig. Men det her er teatralsk kaos af manglende overblik. Oprindelig var idéen at skrive en helt ny historie med de elskede personer. Det havde været det eneste rigtige. Man kan ikke fortælle mere end 24 timers film på fire timer«, skrivar Rikke Rottenstein.

Ummælarin hjá Børsen, Lars Wredstrøm, setir líkasum punktum fyri tey vánaligu ummælini:

»Musicalen er udsolgt til 2008, men brug i stedet de 655 kr. til at køre Matador på dvd«.

Myndatekstur (mynd: matador):

Áhugin fyri sangleikinum um Matador er sera stórur, og fleiri enn 60.000 atgongumerki eru longu seld. Ummælararnir í Danmark halda tó lítið um sangleikin. Mynd: Polfoto